# *10 ár farin*

Tær fyrstu 30 bøkurnar av Fróðskaparritum høvdu allar sama snið og somu útsjónd. Við 31. bók er hetta broytt. Blaðsíðurnar eru størri og í tveimum teigum, so at ritið nú hóskar betur til myndir og tekningar.

Innihaldið í ritinum er eftir nýggja lagnum skipað í tríggjar partar. Í fyrsta partinum — *Greinir og ritgerðir* — verða prentaðar greinir, sum eru lidnar vísindaligar viðgerðir av ávísum evnum. Í øðrum parti — *Frágreiðingar og viðmerkingar* — er ætlanin at leggja fram nýloftað fyribrigdi og fyribils úrslit. Eisini kann verða boðað frá ætlaðum rannsóknum og greitt frá lidnum rannsóknum. Lesararnir kunnu eisini senda inn viðmerkingar til greinir og annað, sum er prentað í ritinum.

Sum ein heilt nýggjur táttur kemur triði parturin *Bókaummæli*. Ummældar verða vísindaligar bókmentir, sum viðgear føroysk viðurskifti ella kunnu metast at hava áhuga fyri føroysk vísindi. Ritstjórnin heitir tí á høvundar og forløg um at senda Fróðskaparritum bøkur til ummælis.

Av tí at 10 ára yvirlitið er so rúgvumikið í hesi bókini, verða bókaummælini at bíða til næsta rit.

*RITSTJÓRNIN*

Fróðskaparrit 31. bók (1983): 105-121.

# *Limir*

## Limir í Føroyum

Leon Andreassen
Símun V. Arge
Dánjal J. Bærentsen
Sverri Dahl
Sigmundur í Dali
Dorete Bloch Danielsen
John Davidsen
Johan Djurhuus
Bogi Hansen
Bergtóra Hanusardóttir
Karsten Hoydal
Hans Jacob Jacobsen
Jan Jespersen
Hanus Debes Joensen
Høgni Debes Joensen
Jákup Sverri Joensen
Jóan Pauli Joensen
Robert Joensen
Jóhannes Jóhansen
Christian Matras
Arnbjørn Mortensen
Sanna Dahl Niclasen
Mortan Nolsøe
Arne Nørrevang
Jóhan Hendrik W. Poulsen
Jóannes Rasmussen
Marner Simonsen
Jóhannes av Skarði
Jón á Steig
Arne Thorsteinsson
Hjalgrím Winther
Petur Zachariassen
Ulf Zachariassen

## Limir uttanlands

Sigurd Amundsen, Danmark
Hans Bekker-Nielsen, Danmark
Jakob Benediktsson, Ísland
Gösta Berg, Svøríki
Håkon Christie, Noreg
Patricia Conroy, USA
Reidar Djupedal, Noreg
Høgni Djurhuus, Danmark
Peter Foote, Ongland
Sigurd Fries, Svøríki
Rolf Guttesen, Danmark
Björn Hagström, Danmark
J. P. Hart Hansen, Danmark
Jón Helgason, Danmark
Kjartan Hoydal, Danmark
Rólant Waag Høgnesen, Danmark
Stefán Karlsson, Ísland
Anthon Kruse, Danmark († 13. des. 1983)
Birger Larsen, Danmark
W. B. Lockwood, Ongland
Magnus Pauli Magnussen, Danmark
Þór Magnússon, Ísland
T. M. Y. Manson, Hetland
Peder Hedebol Nielsen, Danmark
Dánjal Nolsøe, Danmark
Åsa Nyman, Svøríki
G. Pilleri, Sveits
Svend Saxov, Danmark
G. S. Scur, USSR
Povl Skårup, Danmark
Regin Waagstein, Danmark
August G. Wang, Danmark
John F. West, Ongland
Ole Widding, Danmark

# Limir í Føroya Fróðskaparfelag farnir seinastu 10 árini:

**Niels á Botni** varð føddur 30. mars 1895 í Nólsoy og andaðist 20. juli 1982. Hann virkaði sum fuglakonservator í Nólsoy næstan alla ævi sína. Niels á Botni var millum teirra, sum tóku stig til at stovna Føroya Fróðskaparfelag, og í Fróðskaparritum 1. bók hevur hann latið prenta greinina Hugskot um hvítravnin. Hann hevði stóran kunnleika um fuglar og hevur saman við øðrum, serliga bretanum Kenneth Williamson, skrivað fleiri greinir um fuglafrøði í útlendsk vísindalig tíðarrit. Niels á Botni var kendur millum fuglafrøðingar, og hann var tann, sum útlendskir fuglafrøðingar fyrst av øllum vendu sær til, tá teir vitjaðu Føroyar. Hann hevði brævasamband við vísindamenn í nógvum londum.

**Leif Dahl**, føddur 17. oktober 1910 í Vági. Hann tók læknaprógv í Danmark í 1938 og starvaðist sum lækni í Føroyum frá 1940—46 og seinni á Eiði í tíðarskeiðinum 1952—59.

Síðani arbeiddi hann sum lækni í Danmark. Limur í Føroya Fróðskaparfelag gjørdist hann í 1954. Í Fróðskaparrit, 3. bók, skrivaði hann greinina Firvaldar í Føroyum.

Í 1956 gav Føroya Náttúra — Føroya Skúli út bók hansara Firvaldar. Leif hevði firvaldar sum frítíðarítriv. Bæði her í Føroyum og aðrastaðni savnaði hann firvaldar, og hann átti tíðliga eitt stórt savn av teimum. Leif Dahl gav hetta mikla savn, ið at enda taldi einar 3.000 firvaldar, við testamenti til Føroya Náttúrugripasavn í Havn. Tað var hansara týðiliga ynski, at hetta lívsverk hansara skuldi enda í Føroyum. Leif andaðist 15. mai 1982.

**Pauli Dahl**, føddur 9. november 1898 í Vági. Hann tók læknaprógv í Keypmannahavn í 1923 og virkaði síðani sum lækni ymsastaðni bæði í Føroyum og Danmark, til hann í 1931 gjørdist yvirlækni við Dronning Alexandrines Hospital, seinni Landssjúkrahúsið. Hetta starv røkti hann, til hann fór frá í 1967. Limur í Fróðskaparfelagnum gjørdist hann longu árið eftir, at tað var stovnað. Í Fróðskaparrit 1953 skrivaði hann greinina Cholesterolpleuritis. Umframt læknaarbeiðið, ið mangan var ógvuliga strævið, serliga tey fyrru árini, hevði hann eisini politiskt medvit. Hann var m.a. valdur inn á Føroya Løgting í 1943—45 og 1946. Eisini seinni gjørdi hann politiskt vart við seg, m.a. tá hann var stillari hjá Karsteni Hoydal við fólkatingsvalið í 1962. Pauli Dahl doyði 3. mai 1977.

**Petra Djurhuus** varð fødd 11. august 1892 í Nólsoy og andaðist 1. desember 1975. Hon var útbúgvin sum konservator. Petra Djurhuus var ikki limur í Føroya Fróðskaparfelag, men var alla sína tíð ein av ídnastu stuðlum felagsins. Saman við manni sínum Hans Andrias Djurhuus skipaði hon so fyri, at Náttúrugripasavnið og Bátahøllin fingu

tak yvir høvdið. Í Neystinum fingu Fornminnissavnið og Jarðfrøðisavnið eisini arbeiðshøli. Eisini fekk Fróðskaparfelagið innivist har. Minnisstovan, sum Petra Djurhuus læt til minnis um mann sín, er enn arbeiðshøli hjá Fróðskaparfelagnum. Hetta var alt fyri mesta partin gjørt fyri teirra egna pening, sum tey fingu til vega við at selja burtur av ognum sínum.

**Kristjarn Eldjárn** varð føddur 6. desember 1916 á Eyjafirði í Íslandi og andaðist 14. september 1982. Hann var útbúgvin sum fornfrøðingur og gjørdist tjóðminjavørður í Íslandi í 1947. Í 1968 varð hann kosin forseti Íslands. Tá hann fór úr hesum embæti, gjørdist hann í 1980 professari við Háskóla Íslands. Kristján Eldjárn hevur latið mangar vísindaligar greinir og rtigerðir úr hondum, m.a. doktararitgerðina frá 1956 um grevstrarfundir úr víkingaøld í Íslandi. Hann hevði stóran áhuga fyri føroyskum viðurskiftum og fyri norðurlendskum samstarvi. Hann gjørdist limur í felagnum við greinini í Fróðskaparritum 28. og 29. bók um »Papeyjardýrið«.

**Jákup í Jákupsstovu** varð føddur í Seyrvági 7.7.1922. Ungur var hann til skips. Heimsbardagaárini var hann í Keypmannahavn, har hann vann sær lærdóm í handils- og búskaparfrøði. Hann var valdur á ting fyri javnaðarflokkin 1945—46, varð gitin av at einasti maður, ið ikki aktaði boðini, tá ið vera kongur sendi tingmenn til hús aftan á fólkaatkvøðuna í 1946. Árini 1941—54 var hann sýslufulltrúi í Vágum og av og á settur sýslumaður. Skrivari Føroya Fiskimannafelags 1954—71. Blaðstjóri á Fiskimannablaðnum 1954—70. Seinastu árini var hann hjálparmaður á býarbókasavninum í Tórshavn. Hann andaðist 24.2.1976. Hann leitaði sær mentan og lærdóm á ymsum skeiðum og háskúlum uttanlands. Prógv í samfelagsfrøði frá Institute of Social Studies í Haag, Hálandi. Próvritið er Wage Determination and Working Conditions for Fishermen in the Faroe Islands, Haag 1965. Á royndarskeiði í føroyskum á Málstovninum valdi hann sær fólkanøvn eftir manntalinum 1801 sum ritgerðarevni. Úrslitið av rannsóknunum legði hann fram í 7 greinum í Fróðskaparritum 1965—1972. Hann tekur saman um evnið og handfer tað í heild í bókini Fólkanøvn í Føroyum, Tórshavn 1974. Jákup var limur í Fróðskaparfelagnum frá 1965 til deyðadags. 1966—76 var hann roknskapargrannskoðari felagsins.

**J. D. Magnussen**, føddur 27. januar 1912. Dávur var apotekaralærdur. Heimkomin eftir heimsbardagan gjørdist hann landsapotekari. Í Fróðskaparriti 2. bók skrivaði hann grein, ina Rannsóknir um hvussu súrevnistrýstiðkolsýrutrýstið og súrgan ávirka reyðblóðkroppanøringina í glarroyndum. Hann tók upp á seg avgreiðsluna av Fróðskaparritum á stovni sínum, Landsapotekinum. Manna millum var Dávur kendur sum hin glaðlynti hugbirtarin. Annars man eitt av tí sum serliga fer at standa eftir Dáva vera tiltakið, hann fekk í lag í Havn við tí vælumtókta barnadansinum í Sjónleikarhúsinum í fimtiárunum. Hesi mánakvøld saman við Dáva og húski hansara, ið altíð vórðu endað við,

at sungin varð Boðar tú til allar tjóðir, er nakað av tí, ið stórur partur av teimum, ið vóru børn í 50-árunum, minnast við einari serligari gleði. Dávur doyði 10. februar 1975.

**Bjarni Niclasen** varð føddur 2. mai 1919 í Kunoy og andaðist 12. juli 1980. Hann var læraralærdur og starvaðist sum læraraskúlalærari á Føroya Læraraskúla. Bjarni Niclasen var millum teirra, sum stílaðu fyri 5. víkingafundinum, sum var í Føroyum í 1965, og var hann ritstjóri fyri »The Fifth Viking Congress, Tórshavn, July 1965«, sum kom út í 1968. Í hesa bók skrivaði hann m.a. sjálvur stutta grein um heldina, sum er búmerkið hjá víkingafundunum. Í Fróðskaparritum 28. og 29. bók hevði Bjarni Niclasen greinina Nakað um lutir, sum gjørdir eru í Føroyum úr horni, sum kom út eftir deyða hansara. Hann avrikaði eisini nógv annað bæði innan fagrar bókmentir og yrkisbókmentir, sum hann fekk M. A. Jacobsens heiðursløninina fyri í 1979.

**Sámal Petersen**, varð føddur 3. juli 1904 í Klaksvík og andaðist 7. oktober 1974. Hann fekk útbúgving sum lærari á Haslev Seminarium í 1928 og starvaðist øll síni læraraár við Klaksvíkar skúla. Hann var virkin í politikki, var sóknarstýrislimur 1939—51 og tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin 1957—66. Frá 1963—66 var hann tingformaður. Í 1967 kom hann í landsstýrið og sat sum landsstýrismaður til 1972. Hann var leiðari fyri Klaksvíkar Sangkóri í mong ár og hevur givið út songbøkur og skúlabøkur. Av vísindum hevði serliga fornfrøðin hansara stóra áhuga, og hann vitjaði ofta inn á gólvið á Fornminnissavninum. Tá hann sum landsstýrismaður búði á Tinganesi, hevði hann í fríløtum sínum góðar stundir at kanna og skráseta tey gomlu búmerkini á gamla tingstaðnum. Hesar kanningar gav hann út í Fróðskaparritum 20. bók í 1972. Greinin Tingstaðurin á Tinganesi er ein nágreinilig viðgerð av búmerkjunum, sum eisini eru fest á kort. Greinin gjørdi hann til lim í Føroya Fróðskaparfelag sama ár. Sum landsstýrismaður var hann Fróðskaparsetrinum góður og ikki minni Føroya Fornminnissavni.

**Axel Poulsen**, føddur 12. mai 1912. Axel tók læknaprógv í 1937, og síðan 1939 starvaðist hann sum lækni í Havn, í byrjanini lutvíst sum hjálparlækni á sanatoriinum og lutvíst sum kommunulækni. Frá 1957 arbeiddi hann bert sum kommunulækni í Havn, eitt arbeiði, sum ofta kravdi nógv. Axel var limur í Føroya Fróðskaparfelag frá byrjanini. Í Fróðskaparriti 1952 hevði hann greinina Eitt sindur um tuberklasmittuna. Hann hevur skrivað fleiri aðrar læknavísindaligar greinir, og í 1958 gjørdist hann dr.med. við doktararitgerðini Bidrag til den tuberkuløse primærinfektions klinik. Henda ritgerð kom út sum supplementum II hjá Fróðskaparritum. Axel var formaður í Læknafelag Føroya 1940—43. Axel Poulsen doyði 19. september 1979, eitt ár eftir at hann var farin frá sum kommunulækni í Havn.

**Knud Robberstad** varð borin í heim 22. apríl 1899 á oynni Herdla við Bergen og andaðist 31. juli 1981. Professari í løgfrøði á lærda háskúlanum í Oslo síðan 1941, legði frá sær fyri aldur í 1969. Evnisøki hansara var rættarsøga, lutarættur, óðals- og almenningsrættur, altjóða einkamálarættur. Høvuðsáhugi og høvuðstillag hansara var í norskari og norrønari rættarsøgu, men hann fekst eisini nógv við spurningar um galdandi rætt.

Hann var hugaður fyri at verja nýnorskt mál og norskan siðaarv, og var formaður fyri Noregs Mållag og í nevndini fyri Norsk Måldyrkingslag. — Hann var í nevndini fyri Norsk-Færøysk lag og var við til at smíða lógirnar hjá hesum felag.

Limur í Det norske vitskapsakademi síðan 1949, dr. juris h.c. í Reykjavík 1961. Limur í Føroya Fróðskaparfelag síðan 1967 við greinini Løgting og gildi í Fróðskaparritum 10. bók.

# Evnisyvirlit til rit Fróðskaparfelagsins

## A. FRÓÐSKAPARRIT 21.—30. BÓK

## (Navnalisti — List of Names)

1. *Aldenius, J.:* Supplementary List to K. Hansen: Vascular Plants in the Faeroes; sí Bloch, D.
2. *Andreassen, Leon:* Rannsókn Vesturi í Horni í Syðrugøtu. (28. og 29. bók, bls. 175—189 + 1 mynd (tekning)).
3. *Arge, Símun Vilhelm:* Fornfrøðilig rannsókn undir Þorkeris kirkju. (28. og 29. bók, bls. 81—101 + 1 mynd)
4. *Benediktsson, Jacob:* Steinblóð og skynlifur. (28. og 29. bók, bls. 46—51).
5. *Berg, Gösta:* The Collection of Wild Birds' Eggs and Nestlings in Sweden (28. og 29. bók, bls. 132—157).
6. *Bloch, D., J. Aldenius, and T. Lindell:* Supplementary List to K. Hansen: Vascular Plants in the Faeroes. (30. bók, bls. 119—121).
7. *Brú, Heðin:* Erik Arne Bjørk, *27. juli 1918. † 18. mars 1972. (21. bók, bls. 187—189).
8. *Bærentsen, Dánjal J.:* Fyribilsfrásøgn um garnasótt hjá seyði í Føroyum. (23. bók, bls. 60—62).
9. *Christiansen, Tage E.:* Madonna fra Kirkjubøur. (28. og 29. bók, bls. 64—77).
10. *Christie, Håkon:* Bygdekirken på Færøyene sett fra Norge. (28. og 29. bók, bls. 268—282).
11. *Cohn, J.:* Amylo-1,6-glucosidase deficiency (glycogenosis type III) in the Faroe Islands; sí Jensen, B.
12. *Cohn, Jørgen:* Anthropological and Genetic Studies of the Faroese; sí Suter, Diana.